## DAGSINS MEINING

# Nei til happing - ja til lívið!

Mánadagurin tann 10. oktober var altjóða sálarheilsudagur. Í flestu norðurlondum hava myndugleikar og felagsskapir sett fokus á happing í skúla og á arbeiðsplássi. Í okkara grannalondum verður nógv gjørt fyri at fáa happingina burtur úr skúlunum. Vit kunnu t.d. nevna, at í Noregi hevur sitandi forsætismálaráðharrin sett seg á odda í virkseminum hjá tí almenna til tess at fáa broytt huglagið í fólkaskúlanum, har happingin er ein sera stórur trupulleiki. Eftirmaður hansra ætlar at halda fram við hesi ætlan.

Eisini her í Føroyum er ljós varpað á happing í fólkaskúlanum. Í seinasta Skúlablaði er stórt tema um happing. Her verður gjørt vart við, at happingin framvegis er ein stórur trupulleiki í føroyska fólkaskúlanum. Hetta er ikki hugaligur lesnaður. Her eru tungar persónligar lagnur, har dagligur ágangur máar alt sjálvsálit hjá barninum burtur. Samstundis verður gjørt vart við, at bert hendinga skúli ger ítøkligar royndir fyri at koma óskilinum til lívs. Hetta er bæði synd og skomm!

Felagið Sinnisbati hevur eisini rópað varskó. Í leygardagsblaðnum høvdu vit samrøðu við forkvinnuna í Sinnisbata í sambandi við tiltakið Nei til happing. Ja til lívið, sum felagið hevur sett í verk á altjóða sálarheilsudegnum. Samrøðan við forkvinnuna í Sinnisbata gevur somu mynd sum temaið í Skúlablaðnum. Happing er ein burturtagdur trupulleiki, og avleiðingarnar eru álvarsamar hjá tí, sum er fyri happing. Tey happaðu fáa sálarligar trupulleikar seinni í lívinum og gerast so sinnilsiga skadd, at tey illa fáa virkað í gerandisdegnum - ja, summi royna enntá at taka seg av døgum orsakað av happingini!

Vit vita frá kanningum í okkara grannalondum, at happing er ein sera stórur trupulleiki serstakliga í fólkaskúlanum. Tað gongur eisini fram av sama tema í Skúlablaðnum, at tað ber til at bøta um henda álvarsama trupulleika. Í okkara grannalondum t.d. í Noregi verður gjørt eitt miðvíst fyribyrgingararbeiði. Hetta verður gjørt við lóggávu eins væl og við verkætlanum í skúlunum. Tað gongur tíverri greitt fram av báðum hesum sera viðkomandi og álvarsomu samrøðum, ið vit her hava víst til, at lítið og einki verður gjørt í Føroyum. Hetta økið er heilt einfalt ikki raðfest. Hetta kann føroyski almenningurin ikki góðtaka! Tað er, sum blaðstjórin á Skúlablaðnum sigur, at einki er meira týdningarmikið, enn at føroysk skúlabørn hava tað gott. Happing kann ikki góðtakast, og tí mugu avvarandi myndugleikar taka seg um reiggj og skipa fyri, at nakað munagott verður gjørt við hendan trupulleika beinanvegin. Vónandi kann tiltakið á Alheims Sálarheilsudegnum verða eitt stig á hesi leið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fíggjarlógin, ið hækkar skattin á lægri inntøkum

**Kristina Háfoss**
*Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin*



Hóast stórt undirskot staðfestir fíggjarlógin fyri 2006, at nógv umtalaði skattalættin hjá samgonguni stendur við. Men fyri lægri inntøkurnar fer fíggjarlógaruppskotið at merkja eina skattahækking.

Greitt er, at fyri árið 2006 er talan um ein skattalætta á 60 mió. kr. og verður, hesin sum partur av samlaða skattapakkanum á 240 mió. kr. yvir 4 ár, fyrst og fremst latin til hægri inntøkurnar.

Undir 1. viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum er víst á, at hesin skattalætti fyri komandi ár skal skiljast sum endurgjald fyri:

- At barsilsskipanin og harvið 36 mió. kr. eyka nú verða løgd út á arbeiðsmarknaðin.
- At barnaverndarøkið er lagt til kommunurnar at umsita, og hesar sostatt helst mugu hækka kommunuskattin um 30 mió. kr.

Hetta merkir eina avlaging av verandi býti av skattligu byrðunum.

Tí barsilsgjaldið hækkar við sama %-tali fyri allar borgarar, og somuleiðis hækkar kommunuskatturin við sama %-tali fyri allar borgarnar í viðkomandi kommunu. Tvs. talan verður um proportionala skattahækking, ið vil raka lægri inntøkur lutfalsliga harðari enn hægri inntøkur. Eisini kann nevnast at eitt nú vektgjaldið hækkar við 25 mió. kr., og rakar hetta flest allar føroyingar hart.

Hartil kemur, at sokallaða endurgjaldið á 60 mió. kr. í skattalætta nærum bert verður latin til hægri inntøkur.

Hetta vil geva eitt munandi skeivari býti av skattligu byrðunum, til vansa fyri føroyingar við lægri inntøkum - og til vansa fyri teir borgarar, ið búgva í smærri kommunum í útjaðaranum, ið verða noyddar at hækka kommunuskattin meira fyri at rinda fyri barnaverndarøkið, enn stóru kommunurnar, ið eru væl fyri.

Mælt verður staðiliga frá hesi loysn.

Tí ætlanin um eina skatta- og avgjaldshækking til øll, meðan hægri inntøkurnar fáa endurgjald umvegis skattalætta, er ikki ein serliga solidarisk loysn.

Tá heldur finna loysn, ið tryggjar at fíggjarligu byrðarnar ikki gerast enn tyngri hjá føroyingum við lægri inntøkum.

# Uttanumtos, Kjartan

**Gunnleivur Dalsgarð**



At stjórin á Menningarstovuni tók greinina í Starvsblaðnum (nr. 4 2005) at sær, kunnu vit bert fegnast um, men svarið hann kemur við er uttanumtos, tá talan er um tað, sum greinin snúði seg um.

Vit eru yvaleyst samdir um, at umráðandi er, at føroyskt vinnulív og virkir mennast, bæði við virksemi her og í øðrum londum, men treytin eigur at vera, at hetta verður gjørt í góðum samstarvi millum allar partar og ikki leggur upp til at útnytta eina vánaliga støðu fólk í viðkomandi landi hava, og at hetta eisini beinleiðis kastar av sær til at menna virksemi heima.

Men mín atfinning til leiklutin hjá Menningarstovuni at stuðla undir at seta á stovn virkir í Baltalondum, júst hevur til endamáls, at gera sær »dælt« av lágu og vánaligu fíggjarligu støðuni, vinnandi fólki hevur í hesum londum og soleiðis at vinna sær størri avkast, og sum harumframt als ikki hava nakra skyldu at nýta avkastið til at menna okkara egna vinnulív í Føroyum. Tvørturímóti hoyrdu vit í fjølmiðlunum, at fiskur varð keyptur undan vinnumøguleikunum í Føroyum til at virka í »láglønarparadísinum«.

Og tað er her, at vit tala at, at almenna føroyska vinnuamboðið stuðlar undir hesa veiðuferð í einum láglønarlandi. Og hetta meti eg er átaluvert, tí almennu Føroyar eiga ikki at blástempla hetta rákið, men meira kritiskt kanna, hvat er tað, sum ætlanin er, og hvørjar avleiðingarnar eru, tá stig verða tikin at seta á stovn vikrir í øðrum londum. Ikki bara vinningshungurin eigur at verða avgerandi, men eisini grundleggjandi moralsk atlit mugu takast.

Kanska er tað skilbetri, at krákan situr heima og roynir at lívbjarga sær við tí hon hevur, heldur enn at hon fer á veiðuferð inn á onnur at tiltuska sær rovini, tey stríðast við at hjúkla um at varðveita og menna.

W W W . S O S I A L U R I N . F O

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.